Frændur spælir aftur

Frændur spælir á Kambsdali og í Havn í hesum mánaðinum

Helst best umtókti føroyski bólkurin í nýggjari tíð fer at spæla á Kambsdali og í Havn seinni í hesum mánaðinum

TÓNLEIKUR
Pop.fo

Frændur fara nú aftur á pallin. Bólkurin úr Klaksvík fer at spæla á Kambsdali á Gøtustevnu og í Havn á ólavsøku.

Bólkurin spælir sjáldan, men onkrar framførslur eru tó á skránni. Seinastu tvey árini hevur bólkurin verið høvuðsnavn á ólavsøkukonsertini, men í ár verða teir ikki við har. Í staðin fara teir at spæla í teltinum á ólavsøku. Frændur fara at spæla bæði 28. og 29. juli.

Áðrenn tað stendur Kambsdalur á skránni, tí í sambandi við Gøtustevnu fara Frændur at spæla í ítróttarhøllini á Kambsdali leygarkvøldið 20. juli.

Høvuðsmenn í Frændum eru Eyðun Nolsøe, Steintór Rasmussen og Rani Nolsøe, og ætlanin er, at eisini Terji Rasmussen skal verða við í bólkinum. Hann plagdi at spæla við nøkur ár miðskeiðis í áttatiárunum.

No Doubt fekk Clickhaze-fløgu

Clickhaze fekk nógv burtur úr danmarkarferðini

Manningin í Clickhaze hitti kenda amerikanska bólkin á Midtfyns Festivalinum, har báðir bólkarnir spældu í studionum hjá Danmarks Radio

TÓNLEIKUR
Pop.fo

Tá tónleikararnir í Clickhaze í farnu viku skuldu spæla tveir sangir beinleiðis í studionum hjá Danmarks Radio á Midtfyns Festivalinum, hittu tey fólkini í kenda bólkinum No Doubt, sum hevði spælt har frammanundan.

Umboðsmaðurin hjá Clickhaze, Sólarn Solmunde, gav songkvinnuni í bólkinum, Gwen Stefani, eina av nýggju fløgunum hjá Clickhaze, og amerikanska songkvinnan tók ímóti. Tað var tí ein føroysk fløga við í skjáttuni hjá No Doubt, tá tey fóru úr Ringe eftir framførsluna har.

Bæði framførslan hjá No Doubt og Clickhaze vóru sendar beinleiðis á P3.

9 bólkar spæla á ólavsøkukonsertini

Stóra ólavsøkukonsertin verður aftur í ár mannað við ymiskum føroyskum bólkum, sum fara at spæla út á náttina leygarkvøldið 27. juli

TÓNLEIKUR
Pop.fo

Tað verður spennandi at vita, hvat teir í MC Hár fara at finna upp á í ár. Í fjør drógu teir tveir danskarar stripparar í føroyskum litum við sær á pallin.
Mynd: Jens Kristian Vang

Nú er greitt, hvørjir bólkarnir verða, sum fara at spæla á ársins ólavsøkukonsert. Seinastu árini hevur hetta verið landsins største konsert, og áhugin fyri tiltakinum er stórur – bæði millum tónleikarar og áhoyrarar.

9 føroyskir bólkar fara at spæla á konsertini í ár, og tí verður hildið fast um frymilin, sum seinastu árini hevur savnað eini 3000 fólk í Kommunuskúlagarðinum.

Bólkarnir, sum fara at spæla, eru Clickhaze, Tangz, Hatespeech, MC Hár, Krit, Makrel, Déjá Vu, Róin Siggertsson og vinnararnir av Pop Top kappingini, sum leggja fyri klokkan 9. Síðani verður hildið fram til klokkan 3 sunnunáttina.

Tangz rullar aftur

Clickhaze fer at spæla seinast á konsertini, og tað er eisini upplagt. Bólkurin er heitasta navnið í føroyskum rocktónleiki júst nú, og tey eru væl fyri eftir nógva venjing og nógvar framførslur heima og úti.

Bólkurin er júst komin aftur av væl eydnaðari danmarkarferð, har tey spældu á trimum stóru tónleikafestivalum og fingu góð ummæli.

Vert er eisini at leggje merki til, at Tangz nú fer aftur á pallin, eftir at bólkurin ikki hevur spælt nógv síðani seinastu ólavsøkukonsertina. Tveir av limunum hava verið í Svøríki á skúla seinasta árið, og tí hevur bólkurin ikki gjørt so nógv um seg.

MC Hár plagar at finna upp á okkurt stuttligt, tá teir spæla til slík tiltøk. Í fjør høvdu teir tveir danskarar stripparar við sær á pallin, og tað er ivaleyst onkur sum er spentur at vita, hvat Niels Uni og teir finna upp á í ár.

Forsølan

Ólavsøkukonsertin hevur nú funnið fastar karmar í Kommunuskúlagarðinum, og síðani konsertin byrjaði aftur har, og fyrireikararnir hava gjørt nógv burtur úr skránni, hava fólk veruliga tikið undir við konsertini.

Í fjør tosaði FUT, sum skipar fyri konsertini, um, at nú var tíðin kanska komin til at bjóða útlendskum bólkum við til konsertina, men í ár verður so eingin útlendskur bólkur. Tað nærmasta konsertin kemur ti er útisetin Róin Siggertsson, sum fer at spæla saman við bólki sínum.

Forsølan til konsertina byrjar um stutta tíð, og vanligt hevur verið, at nógv atgongumerki verða seld framman undan, tí fólk vilja tryggja sær pláss á landsins størstu konsert.

Skúmveitsla á vestanstevnu

All That Rain bjóðar til skúmveitslu, tá bólkurin fer at spæla í teltinum í Miðvági á vestanstevnu fríggjakvøldið.

Bólkurin hevur fleiri ferðir áður drigið okkurt óvæntað úr skjáttuni, tá teir hava verið úti og spælt, og teir hava millum annað brúkt nógv fýrverk í teirra framførslum.

Nú fara teir undir nakað heilt nýtt í Føroyum. Bólkurin hevur fingið eina serliga maskinu til Føroya, sum verður brúkt til at spræna skúm. Hetta er ikki ókent fyribrigdi á diskotekum uttanlands, men nú sleppa føroyingar eisini at uppliva hetta.

All That Rain spælir í Miðvági fríggjakvøldið, og seinasta partin av dansinum verður skúmveitsla í teltinum.

So kanska tað er upp á sítt pláss at hava svimjiklæði ella bikini við í danshesaferð

Pop.fo

Jóannes Jakobsen:

FSF hevur klokkað í tí

Jóannes Jakobsen, fyrrverandi liðskipari á landsliðnum, heldur, at tað er ein háðan ímóti føroyskum fótbólti, at nýggi landsliðsvenjarin, Henrik Larsen, enn ikki hevur sæð nakran dyst
Savnsmynd

Jóannes Jakobsen, sum millum annað í fótbóltshøpi, er kendur fyri at vera fyrrverandi liðskiparin hjá føroyska landsliðnum, heldur, at tað, at landsliðsvenjarin, Henrik Larsen, enn ikki hevur verið og sæð nakran dyst, er ein háðan ímóti føroyskum fótbólti

LANDSLIÐIÐ
Ingrid Bjarnastein

Í seinastuni hevur spurningurin ofta verið reistur, hví nýggi føroyski landsliðsvenjarin, Henrik Larsen, enn ikki hevur verið at sæð í Føroyum. Hann varð settur sum landsliðsvenjari hálvan apríl, og nú næstan tríggjar mánaðar seinni, hevur ongin sæð í halaferðina av honum. Landsliðsvenjarin hevur ongan dyst sæð í fyrstu deildar fótbólti, og tað fer hann helst heldur ikki fyrr enn seinast í hesum mánaðanum.

Men hvat siga fótbóltskønir føroyingar til, at venjarin enn ikki hevur kannað sær spælarar, nú bert knappir tveir mánaðar eru til fyrsta veruliga HM-undandystin?

– Hetta er ein háðan yvirfyri føroyskum fótbólti, sigur Jóannes Jakobsen, sum er fyrrverandi landsliðsspælari og fyrrverandi venjari í føroyskum fótbólti.

– Men tað er ikki Henrik Larsen, sum hevur skyldina í tí. Tað er Fóbóltssambandið, sum hevur klokkað so regulert í tí.

Jóannes sigur millum annað, at FSF vildi hava ein venjara, sum kundi verða meira tøkur.

– Tá teir so seta ein høvuðsvenjara, sum ikki er her javnan, og ein hjálparvenjara, sum longu er venjari hjá einum fyrstu deildar liðið er ongin møguleiki fyri, at uppgávan kann verða fullførd.

Enten eller

Jógvan Martin Olsen, sum er hjálparvenjari hjá landsliðnum, er eisini venjari hjá NSÍ.

– Um hjálparvenjarin ikki kann fara út og hyggja eftir spælarunum er ongin, sum kann taka hesa uppgávuna á seg. Jógvan Martin megnar ikki at taka sær av bæði landsliðnum og NSÍ. Antin svíkur hann landsliðið ella svíkur hann NSÍ, sigur Jóannes Jakobsen.

Fyrrverandi liðskiparin heldur eisini, at ein kundi ynskt, at Henrik Larsen kanska hevði hjartað meira við í tí, sum hann ger.

Úttalilsini higartil hjá Henrik Larsen hava verið greið. Hann ætlar sær at læra føroyingar at spæla fótbólt, stigini skulu fáast heim og Todi skal aftur á liðið. Eisini ætlar hann at gera broytingar á liðnum uttan at yvirhøvur hava sæð nakran dyst, men bert ein navnalista.

– At landsliðsvenjarin sigur, at hann ætlar at gera broytingar, bert við at hava sæð ein navnalista, tykist eitt sindur lunkað. Haraftúrat, so duga føroyingar at spæla fótbólt. Kanska ikki eins væl og tey stóru londini, men hatta hevur so aftur nakað við stílin hjá teimum ymsu persónunum at gera. Hatta kann eisini raka hann aftur seinni, metir Jóannes.

– Fótbóltsambandið hevur arbeitt vánaligt. Høvuðsvenjarin er ikki nóg tøkur, og hjálparvenjarin kann ikki tæna bæði landsliðnum og sínum egna liði. Hetta er ein mannminking mótvegis føroyskum fótbólti.

Roynt hevur verið at fingið eina viðmerking frá formanninum í Fóbóltsambandinum, Dánjal Andreasen, men hann hevur ikki verið til at fáa fatur á áðrenn blaðið fór til prentingar.

Henrik Larsen, sum var settur sum landsliðsvenjari hjá føroyska A-landsliðnum, sigur seg vilja gera broytingar á landsliðnum, uttan at hava sæð nakran dyst
Savnsmynd